


www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 09 - 2011

# Grønland fær meiri burtur úr Cairn

Grønlendska landsstýrið, kommunurnar og skotska oljufelagið Cairn Energy hava skrivað undir eina nýggja samstarvsavtalu, sum kemur ístaðin fyri avtaluna, sum partarnir gjørdu í fjør. Grønlendska kringvarpið sigur, at grønlendingar fáa munandi meiri burtur úr teirri nýggju avtaluni. Eitt nú hevur Cairn sum mál at keypa vørur og tænastur í Grønlandi fyri 244 milliónir krónur. Í fjør var tað talið 153 milliónir. Í fjør keypti Cairn fyri 19 milliónir krónur frá grønlendskum undirveitarum, men í terri nýggju avtaluni hevur felagið sett 67 milliónir krónur av til sama endamál. Herumframt hevur skotska oljufelagið játtað at økja stuðulin til útbúgving. Í fjør rindaði felagið 1,3 millión krónur í útbúgvingargrunn, men nú er játtanin tvífaldað til 2,6 milliónir krónur. Tann nýggja avatalan gevur eisini fleiri grønlendingum arbeiði hjá oljufelagnum. Í fjør vóru 50 grønlendingar á lønarlistanum hjá Cairn, men nú verða teir 55.